Landsssjúkrahúsið




# Sigmoideoskopi

## Kikarakanning av niðasta parti av langanum

**Hvat er ein sigmoideoskopi?**

Sigmoideoskopi er ein kikara kanning av niðasta parti av langanum. Læknin sum ger kanningina, sær tarmrovuna og um broytingar eru.
Ígjøgnum eina kanal i kikaranum, ber til at taka vevna frá til kanningar.

**Fyrireiking til kanningina**

Tað er umráðandi, at tarmurin er væl úttømdur, so tarmrovan sæst best møguligt.

Tú skalt keypa Toilax kombipakka, sum fæst í hondkeyp á Apotekinum og fylgja vegleiðingini, sum stendur aftanfyri á pakkanum.
Tú kanst eta sum vanligt.

Tekur tú blóðtynnandi heilivág, set teg í samband við okkum.



**Kanningin**

Sjálv kanningin tekur uml. 20 minuttir.
Tú verður lagdur á eina legu, á vinstru lið.
Ein slanga (uml. á tjúgd við tummilin) verður førd inn í baktarmin og upp í langan.
Fyri at síggja tarmrovuna verður luft blást inn í tarmin, hetta kann spenna, pressa og geva magapínu.

Tað er ymiskt hvussu leingi kanningin tekur, og tí kann tað verða bíðitíð.

**Eftir kanningina**

Læknin kann beinavegin siga tær, hvat hann hevur sæð og, seta teg í viðgerð. Er vevnaður tikin frá til kanningar, ganga 1-2 vikur, til svar kemur og tá verður tosað við læknan um víðari viðgerð.

Tú kanst verða plágaður av luft í tarminum restina av degnum.

Ført tú sterka magapínu, varnast blóð í opninginum ella frískt blóð frá baktarminum, skal tú venda tær til kommunulæknan ella vaktlæknan.

**Hevur tú fingið doyvandi heilivág, mást tú ikki koyra bil restina av degnum. Heilivágurin ger eisini tað, at tú møguliga, ikki minnist alt frá kanningini.**



Dagført: mai 2015

Tú kanst lesa meira um deildina á www.ls.fo, har tú eisini finnur vegleiðing um, hvar tú skal møta.

Ber ikki til at koma ásettu tíð, er umráðandi at siga frá sum skjótast, so møguleiki er at innkalla annan sjúkling. Um tú hevur móttikið hetta skrivið í Mínboks, ber til at svara og samskifta umvegis Mínboks. Somuleiðis ber til at senda teldupost til skurdinfo@ls.fo. Telefontíð er millum kl. 14:00 og 15:00 gerandisdagar á telefon 304734

Um tú ikki hevur fingið hetta skriv í Mínboks, er møguleiki at tekna teg á www.minboks.fo.

Hetta fer at gera arbeiði okkara bæði lættari og skjótari, til gagns fyri teg.

Dagført: feb. 2017

Landssjúkrahúsið

Endoskopieindin

tel 304500 ww.ls.fo